# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# MUGU GREIÐA FRÁ HARÐSKAPINUM

Tað vóru skelkandi tíðindi, sum vóru at hoyra í Klaksvík í gjár, har vitni greiddi frá, hvussu tveir løgreglumenn høvdu bukað og bankað tveir ungar mans uttan fyri festivaløkið hjá Summar Festivalinum, eftir at teir vórðu lagdir í hondjørn.

Vitnið greiðir frá, *at drongurin varð sparkaður og sligin meðan hann stóð í hondjørnum. Teir bakaðu høvdið móti húsaveggjinum og sparkaðu hann, sjálvt um hann ikki fekk vart seg. Tá ein vinmaður spurdi løgregluna, hví teir bankaðu dreingin, bleiv hann eisini bankaður, lagdur í hondjørn, sparkaður og tveittur aftur og fram av løgregluni,* greiðir vitnið frá.

Hetta er skakandi og lítið virðiligt fyri løgregluna. Hetta fær okkum at hugsa um amerikanskar tilstandir, har løgregluharðskapurin hevur ført til miklan ófrið. Um frásøgnin er sonn, so hevur fútin ein stóran trupulleika.

Uppgávan hjá løgregluni er júst at fyribyrgja, skapa frið og tryggleika. Tí ljóðar tað heilt ófatiligt, um tað passar, at løgregumenn hava sýnt slíkan atburð, sum frættist úr Klaksvík um vikuskiftið. At teir leggja menn í hondjørn kann vera sín sak, um tað er tiltrongt, so er tað eisini í ordan. Men tað kann ongantíð verða rætt, at løgreglumenn skulu sparka og sláa fólk, sum teir hava lagt í hondjørn.

Vitnið greiðir víðari frá, at tá hon royndi at blanda seg fekk hon at vita, at um hon ikki slapp sær burtur, skuldi løgreglumaðurin knúsa hana sundur.

Hetta ljóðar ikki minni hugaligt, at løgreglufólk beinleiðis hótta fólk við harðskapi. Neyvan er tað altíð stuttligt at vera løgreglufólk, men vit mugu krevja av teimum, at teir duga at stýra sær, og at teir ikki lata sinnalagið taka valdið á sær.

Sjálvandi skal løgreglan hava loyvi til at kanna málið. Og sjálvandi skulu allir partar hoyrast, tá so grovar skuldsetingar verða settar fram. Tað síðsta nýggja er, at Ferðaliðið hjá donsku løgreglu kemur at kanna málið.

Í øllum førum er tað eitt krav, at ein almenn frágreiðing kemur um hendingina, so virðingin og respektin fyri løgregluni ikki fer fyri bakka.



## Eiga at hava virðing og respekt fyri løgregluni

# Avmynda náttúrumargfeldi



Í samband við at ár 2010 er altjóða ár fyri lívfrøðiligt margfeldi, hevur Lívfrøðingafelagið saman við Miðlahúsinum skipað fyri eini myndakapping, har endamálið er at lýsa lívfrøðiliga fjølbroytni í føroysku náttúruni. Kappingin heldur fram til 16. august.

Við hesum ynskir Lívfrøðingafelagið, at fleiri fáa eyguni upp fyri livandi náttúruni og fara út at taka myndir, sum kunnu lýsa hetta fjølbroytta lívið ella við øðrum orðum: avmynda lívfrøðiliga margfeldni í Føroyum. Tá kappingin er liðug, verða allar innkomnu myndirnar at síggja í myndatema á Portalinum.

Vinningar verða latnir til tríggjar tær bestu myndirnar:

1. vinningur: Eitt Canon EOS 550 fototól (virði: kr. 7.999). Ein Case logic taska (virði: 399 kr.) og eitt 16 GB kort (virði: 699 kr.) fylgir við. Vinningurin verður latin av Føroya Lívfrøðingafelag.

2. vinningur: Eitt Canon EOS 450 speglrefleks fototól (virði: kr. 4.999). Vinningurin verður latin av Expert

3. vinningur: Ein 1 TB eksternur harðdiskur (virði: kr. 980), ið verður latin av City og kr. 1.500, ið verður latið av Lívfrøðingafelagnum

Reglarnar siga, at myndin skal vera digital og vera tikin í Føroyum í 2010. Kappingin byrjaði 7. juni og endar 16. august. Hvør luttakari kann einans senda eina mynd til Miðlahúsið seinast hin 16. august 2010. Myndin skal sendast til margfeldi@sos.fo

Lívfrøðingafelagið tekur sær rætt til at brúka innkomnu myndirnar í arbeiði felagsins framyvir, t. d. til heimasíðu, plakatir og faldarar.

Ein dómsnevnd, ið er samansett av trimum pørtum, velur bestu myndirnar. Hvør partur hevur líka nógvar atkvøður. Teir tríggir partarnir eru nevndin í lívfrøðingafelagnum, ein professionellur myndatakari og eitt listafólk.



## Verður stuðulsskipanin tann besta?

HANUS SAMRÓ
KJAK Á SÍÐU 12



## Umfordeiling á almannaøki

JOHN JOHANNESSEN
KJAK Á SÍÐU 28



*Peter Rutterford, majorur, var leiðari fyri Royal Marines, tá teir vitjaðu í Føroyum í 1990. Hann vitjaði í gjár við við ferðamannaskipinum Minerva*

*Mynd: Jógvan á Dul*

# Royal Marines leiðari vitjaði

Royal Marines leiðari vitjaði

Í gjár vitjaði bretska ferðamannaskipið frá Swan Hellenic, Minerva, á Havnini. Ferðafólkini vóru millum annað útferð undir Vestmannabjørgunum. Við á ferðini var Peter Rutterford, majorur. Jógvan á Dul, sum var ferðaleiðari, greiddi millum annað ferðafólkunum frá bretsku hersetingini undir krígnum. Tá var tað, at Peter Rutterford segði honum, at hann var leiðari av Royal Marines, tá teir vitjaðu aftur í Føroyum í 1990 - fimmti ár eftir hersetingina.

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*